# Brúkt á marknaðardegi

**Leygardagin tann 13. november verður stóri býtis- og marknaðardagurin úti á Polarfrost í Vági**

MARKNAÐARDAGUR
*tíðindaskriv*

Helst er tað rætt at fólk hava alskins ting í húsinum, sum tey ikki brúka. Og helst eisini so, at órudd er strævið at hava í húsinum. Kanska hava vit brúk fyri einum skumpi fyri at fara í holtur við at rudda upp.

Men eitt er at rudda og eitt annað er hvussu vit sleppa okkum av við lutirnar. Her er tað at umhvørvishugsjónin kemur inn. Ofta kann verða talan um ting sum fullvæl kunnu brúkast aftur, og tað er sosatt ongin orsøk at tveita tey í ruskposan. Sum oftast eru vit eisini góð við summi ting og tá kann tað verða lættari at sleppa sær av við tey, um vit vita at onkur annar kann fáa gleði av teimum.


*So er tøma sær kjallararnar. Møguliga er okkurt her, sum kann seljast á komandi marknaðardegnum*

Nú verður so fyriskipaður ein øðrvísi marknaðardagur har børn, ung og vaksin kunnu koma við sínum tingum. Tey kunnu selja tey, men til ber sjálvandi eisini at skifta um við onkran annan og í slíkum handli eru ikki pengar í leikinum. Tey, sum hvørki eru áhugaði í at selja ella skifta um, kunnu seta góð ting frá sær og so kunnu tey sum vilja fáa sær úr rúgvuni.

Málsetningurin við býtis- og marknaðardegnum er:

- fólk sleppa sær av við ymiskt, tey ikki hava brúk fyri
- at ting sum eru góð, heldur skifta eigara enn at tey verða blakað í IRF bingjuna

Tað er Kunningarstovan í Vági, sum skipar fyri tiltakinum, ið er ókeypis. Best er tó, um fólk boða frá luttøku soleiðis at tey sum skulu selja okkurt fáa eitt borð at standa við og seta síni ting á. Áhugaðir luttakarar verða biðin um at siga frá á Kunningarstovuni.

# Showmenn spæla á Platform


*Leygarkvøldið fara Kim Hansen og hansara menn í Showmonnum at spæla til dans á Platform í Havn*

Nú leygarkvøldið verður so aftur høvi til at hoyra Kim Hansen, James Olsen, Jens Marna Hansen og Jóhannus á Rógva live á Platform í Havn.

Showmenn verða mettir sum besta liveorkestrið í Føroyum í løtuni. Teir hava spælt sera nógv seinasta árið, og tað hoyrist aftur á pallinum. Tónleikurin svingar sera væl, og teir eru vorðnir serkønir í at fáa eina og hvørja áhoyrarfjøld við.

Platform hevur eisini sum vanligt ymisk tilboð í sambandi við

**-pop.fo**

# Jólaboð at fáa

Í bókini í ár ber til at lesa siðsøguligar greinar, yrkingar og søgur. Bæði upprunaligar føroyskar og týddar.

Eitt nú hugleiðir Benny Drewsen um jólini, sum tey vóru, tá hann var barn. Sigvald Kristiansen hevur samrøðu við Poul Andrias Hansen um ferð heim úr Grønlandi. Farið verður eina ferð við mjólkarbátinum, eins og Heri Tróndheim sigur frá um eina eldri konu, sum hann hitti, einaferð hann vitjaði í heimbygdini.

Aðrar søgur eru sjálvandi eisini at lesa, og so eru tað sjálvandi eisini yrkingarnar, sum eru fleiri og vakrar.

Hópur av tekingunum eftir Janus Dam Guttesen eru í bókini, eins og fleiri myndir eisini eru. Kápumyndina hevur Absalon Hansen tikið, og Guttorm Zachariasen hevur lagt til rættis.

**-jm**





















TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin við Løgmannabreyt eftir:**
- tveimum pedagogum, at arbeiða 30 tímar um vikuna í barnagarðsstovu at byrja 01. desember 2004 ella eftir nærri avtalu.
- tveimum pedagogum at arbeiða 30-35 tímar um vikuna til vøggustovu at byrja 01. januar 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Sofíu Nattestad, stovnsleiðara, ella Elisabeth Rasmussen, varaleiðara á tlf. 319105 ella 219105.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum við Løgmannabreyt, Boks 3027, 110 Tórshavn, í hendi í seinast lagi mánadagin 22. november 2004.

**Býlingshúsið á Ternuryggi eftir:**
- einum pedagogi til barnagarðsstovuna Sóljuna at arbeiða 30 tímar um vikuna byrja 1. desember 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Heidi Henriksen, stovnsleiðara, tlf. 318626.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5A, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. november 2004.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Dagstovnurin við Løgmannabreyt**
Á stovninum eru tvær vøggustovur við 12 børnum í hvørjari, og tvær barnagarðsstovur við 21 børnum í hvørjari. Fýra starvsfólk eru í hvørjar i stovu.

**Býlingshúsið á Ternuryggi**
Á býlingshúsinum eru tríggjar stovur, tvær barnagarðsstovur og ein vøggustova. Har ganga tilsamans 52 børn og har eru 11 starvsfólk.

www.torshavn.fo